# Enn ein gassfløska á veg inn í ovnin

**Bert fáar dagar eftir, at starvsfólk á brennistøðini hjá IRF í Leirvík av tilvild funnu eina gassfløsku undan at verða koyrd í ovnin, komu tey fram á enn eina óásetta gassfløsku av júst sama merki, sum hin fyrra.**

SAMFELAG

*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

Tað er ein ørkymlaður Poul Andrias Joensen, vit práta við í morgun.

Enn einaferð hava tey funnið eina fulla og óásetta gassfløsku í køstinum hjá IRF. Og enn einaferð var tað í evstu løtu, at hon varð bjargað undan eldhavinum í ovninum á Hagaleiti, har hon lættliga kundi eksploderað, og ovnurin farið í luftina.

- Dagliga starvast eini 15-20 fólk í besta aldri her, og til tíðir eru vit upp í 50 fólk. Tað liggur alla tíðina í bakhøvdinum á okkum, at ovnurin kann fara í luftina nær sum helst, sigur Poul Andrias Joensen.

### Funnin av tilvild

Eftir hendingina í síðstu viku, taka tey ongar kjansir hjá IRF. Alt, sum tey koyra í ovnin, verður slept niður úr grabbaranum einaferð eyka, so vissa fæst fyri, at ongin gassfløska er í dunganum, greiðir Poul Andrias Joensen frá. Og tað var júst soleiðis at ein av arbeiðsmonnunum kom fram á gassfløskuna sunnukvøldið.

– Fyrr í ár sprongdist ein trýstfløska í ovninum og gjørdi stóran skaða. Síðan tað hava vit økt upplýsingina, millum annað á heimasíðuni. Men nú tað hendir aftur, er tað púra greitt, at her má okkurt gerast. Vit ætla skjótast gjørligt at finna útav, hvat kann gerast fyri at betra trygdina.

### Sera vandamikið

Poul Andrias sigur, at tað er ilt at siga, hvørjar avleiðingarnar høvdu verið, um gassfløskan endaði inni í ovninum.

- Og eg hevði heldur ikki latið tað staðið sína roynd, sigur Poul Andrias, sum júst í hesum døgum er í fer við at kanna, hvussu stóran skaða ein tílík aluminium gassfløska við 26,2 litrum av propangassi hevði gjørt, varð hon slept inn í ovnin.

– Men eingin ivi er um, at fólk, sum eru inni í høllini eru í stórum vanda, um ein gassfløska fer í luftina. Og her skulu vit eisini minnast, at tað eru ikki bara starvsfólk, sum koma inn í høllina, men eisini skúlaflokkar og barnagarðar, tá tey arbeiða við ruskinnsavning, sigur Poul Andrias Joensen. Og hann leggur afturat, at hendan seinna fløskan var í væl verri standi enn tann fyrra, helst tí, at hon hevur ligið í dunganum í eina tíð.

- At blaka eina gassfløsku í eina bingju er ikki bara vandamikið, um hon endar í ovninum. Hon er úr tunnum aluminium og liggur og esjar móti øðrum metallum. Tá kann hon fara at leka ella sprongjast í sambandi við, at bingjan verður tømd av einum av okkara bilum. Og tá teir koyra millum hús og handlar, er ikki tespiligt at hugsa, hvat kann henda, brestir gassfløskan.

### Hava illgruna til onkran

Spurdur um tey hava varhugan av, hvør hevur blakað gassfløskurnar burtur á hendan ábyrgdarleysa og vandamikla hátt, sigur hann, at tey hava illgruna um, at báðar gassfløskurnar eru komnar inn við somu sending av ruski.

- Vit duga at spora, hvar báðar fløskurnar lógu, áðrenn tær vóru koyrdar inn til ovnin, og vit vita nøkulunda, hvør bilur hevur tømt rusk út á hetta økið hendan ávísa dagin, sigur Poul Andrias Joensen. Og hann greiðir frá, at tey hava sett seg í samband við fólk, sum tey hava illgruna til, og biðið viðkomandi kanna umstøðurnar rundan um eina ávísa bingju.

- Gassfløskan er merkt við nummari, men hetta ger ikki, at tað ber til at spora fløskuna, tí fløskan er av tí slagnum, sum Føroya Gassøla selur til vanligar handlar, ið ikki skráseta, hvør keypir tær. Og tí kann IRF heldur ikki fara víðari við málinum, sigur Poul Andrias Joensen.



*Arbeiðsmenn á IRF við báðum gassfløskunum, sum teir eru komnir fram á seinastu vikuna. Frá vinstri Heini, Heri, Páll, Jákup Petur og Ólavur. Fløskan til vinstru er tann seinna, sum varð funnin. Sum vit síggja, er hon nakað løstað.* *Mynd: Poul Andrias Joensen*

### Tørvur á herferð

Men hvat heldur Poul Andrias Joensen átti at verið gjørt at forða fyri at slíkt endurtekur seg?

- Vit eru í villareiði nú. Men greitt er, at allar mannagongdir mugu eftirmetast, tí okkurt riggar ikki í skipanini, sum hon er, sigur hann.

Og Poul Andrias greiðir frá, at ein trupulleiki er, at tá størri tiltøk, festivalar og stevnur eru, má nógv gjøllari eftirlit vera við burturkastinum.

- Aðrastaðni er vanligt, at ein ábyrgdarpersónur verður settur at skipa ruskinnsavningina, har nógv fólk eru møtt upp til eitt stórt tiltak. Hetta verður helst eisini eitt krav her framyvir, greiðir Poul Andrias frá.

- Annað, sum vit eiga at gera nógv meira við, er at upplýsa fólk um, hvussu tey skulu handfara rusk. Tað er ein uppløgd uppgáva hjá myndugleikunum at gera eina rættiliga upplýsingarherferð nú hetta er komið fyri so ofta, sigur Poul Andrias, sum heldur tað vera eitt gott hugskot at hava sonevndar rusk-konsulentar, sum taka sær av at upplýsa um burturkast. Og hann leggur afturat, at tey helst framyvir fara at taka stakroyndir í burturkastinum hjá fólki, og um komið verður fram á eitthvørt vandamikið, fær eigarin eina ordans bót.

– Fyrr í ár sprongdist ein trýstfløska í ovninum, og gjørdi stóran skaða. Síðan tað hava vit økt upplýsingina, millum annað á heimasíðuni. Men nú tað hendir aftur, er tað púra greitt, at her má okkurt gerast. Og vit ætla skjótast gjørligt at finna útav, hvat kann gerast fyri at betra trygdina, sigur Poul Andrias at enda.

STUTT SAGT

## Sjómannadagur á 11 støðum

**Klaksvík:** Ikki kann sigast annað enn, at fyrireikingararbeiðið í sambandi við sjómannadagin hevur verið sera umfatandi.

Tað sæst aftur á umfatandi og fjølbroyttu skránni, og tað sæst aftur í øllum tí økinum, sum tiltakið fevnir um. Í roynd og veru verður tiltakið á ikki færri enn 11 ymiskum støðum í býnum.

Høvuðspallurin fyri flestu tiltøkini er á ferjuleguni, har Sam nú leggur at. Her verða FM-kappingar av ymiskum slagi skipaðar og onnur tiltøk. Ein minni pallur verður eisini settur upp norðanfyri egningarskúrarnar, har m.a. harmonikutónleikur verður at hoyra.

Eitt stórt tjald hoyrir sjálvandi eisini við til ein slíkan dag, og tað verður sett upp beint norðan fyri høvuðspallin. Í hesum tjaldi verða m.a. framsýningar við útgerð til bátar og skip. Har verður eisini eitt serstakt sjómannamøti sunnudagin.

Á einum øðrum staði verður ein framsýning av livandi fiskum og skeljadjórumm, og á enn einum øðrum staði verða modelbátar sýndir fram, eins og myndir og filmar verða sýndir fram.

**sb.**

## Ein hátíð fyri alla tjóðina

**Klaksvík:** Føroya Sjómannadagur er eitt høvi hjá okkara sjófólki at savnast á einum staði, bæði til gaman og álvara, har høvið verður hjá teimum at njóta samveruna við hvørjum øðrum og við starvsfelagar í fiskivinnuni á landi og landsmonnum okkara.

- Við hesum degnum hava vit fingið eina hátíð fyri alla tjóðina, sum liggur á røttum staði og í viðkomandi umhvørvi her í fiskivinnuhøvuðsstaði okkara.

Soleiðis tekur borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen til í heilsan síni til gestirnar sum um vikuskiftið fara at vitja heimbý hansara.

Hansara vón er, at hesin dagurin fær loyvi til at vera ein einstakur serstakur dagur, sum ikki verður kopieraður og eftirlíknaður av øðrum. Um so verður, er vandi fyri at dagurin og hugskotið aftanfyri hann verða útvatnað.

Borgarstjórin í Klaksvík staðfestir, at Sjómannadagurin, sum nú verður fyriskipaður á øðrum sinni, er komin fyri at vera.

- Í ár er skráin fjølbroyttari enn nakrantíð. Hjá øllum er okkurt áhugavert at vitja, og ikki at tala um: Tiltøkini eru ókeypis!, slær hann fast.

Sjómannadagurin er komin fyri at verða.